

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum framleiddi 54.000 føt í apríl

**Jógvan Hugo Gardar**

04.05.2015 - 13:59

Oljan.fo

Atlantic Petroleum framleiddi í apríl góð 54.000 føt av oljulíkum (foe) frá sínum brunnum Chestnut, Ettrick og Blackbird.

Meðalframleiðslan per dag hjá Atlantic Petroleum gjørdist 1800 føt.

Hummingbird skal til árligt viðlíkahald nú, og hetta kemur at ávirka framleiðsluna í mai.

Atlantic Petroleum hevur alla sína framleiðslu í írskum, bretskum og norskum sjógvi, og fyritøkan hevur í dag 37 olju- og gassloyvir í hesum økinum. Harafturat hevur Atlantic

Petroleum ognarpart í oljubrunnum sum skulu fara undir framleiðslu í 2016, umframt fleiri leitiloyvir sum kunnu koma at geva framleiðslu í framtíðini